# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 11/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum** (Hækking av grundupphædd til fólkapensjón)

Bárður S. Nielsen, Edmund Joensen, Magnus Rasmussen og Bjørn Kalsø hava, vegna Sambandsflokkin, lagt málið fram 10. september 2018, og eftir 1. viðgerð 27. september 2018, er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. og 23. oktober, 6.  20. og 27. november, 4., 7. og 11. desember 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista og landsstýrismannin í almannamálum, Eyðgunn Samuelsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Katrin Kallsberg, Djóni Nolsøe Joensen, Óluva Klettskarð og Sonja Jógvansdóttir) hevur hesar viðmerkingar:
Eftir at skiftandi samgongur í áravís høvdu arbeitt við eini pensjónsnýskipan kom loksins undir land í vár.

Tá uppskotið til nýggja pensjónsskipan varð framlagt av samgonguni og Sjálvstýri, varð staðfest, at løtan fyri langari tíð síðan var komin at fremja eina pensjónsnýskipan í Føroyum.
Flokkarnir vóru samdir um, at hendan framtíðar pensjónsskipanin skuldi lúka hesi 3 aðalmál:
- Tryggja hægri pensjón til pensjonistar við lágari og miðal inntøku.
- Gera tað meira lønandi at arbeiða eftir pensjónsaldur.
- Styrkja fíggjarliga haldførið og framtíðartryggja vælferðarsamfelagið.

Yvirskipaða endamálið við pensjónsnýskipanini er at tryggja framtíðar fólkapensjonistum eitt virðiligt fíggjarligt grundarlag, sum tekur atlit at framtíðar demografisku broytingunum, og at fáa eina pensjónsskipan, sum kann tillagast umstøðunum hjá tí einstaka fólkapensjonistinum.
Verandi pensjónsskipan hevur alsamt truplari við at tryggja teimum pensjonistum, ið ikki hava eina munandi uppsparing ella framíhjáinntøku, eina nøktandi upphædd at liva av, og tí varð beinanvegin tryggjað fíggjarliga veikastu pensjonistunum eitt hægri útgjald við at hækka Samhaldsfasta. Harumframt verður sjálvvirkandi javning av almannaveitingum sett í verk.

Galdandi skipan tekur ikki hædd fyri, at alsamt fleiri í dag eru so væl fyri, at tey vilja arbeiða longur enn til pensjónsaldurin, og tí kundu verið hugað at útsett almennu pensjónina. Tað er at fegnast um, at 67 ára gomul í dag kunnu rokna við at liva væl longur enn fyrr. Ein skipan við útsettari pensjón er samtykt, har fólk kunnu velja at arbeiða longur, og samtíðis frásiga sær almennu pensjónina, ímóti at fáa hægri útgjald, tá tey fara frá. Harumframt er skipanin við framskundaðari pensjón, sum hevur til endamáls at geva persónum, sum eru likamliga ella sálarliga niðurslitin ein møguleika at fáa pensjón fyri fólkapensjónsaldur.

Pensjónsskipanin verður framvegis grundað á 3 súlur – almenna pensjón, Samhaldsfasta og egna uppsparing. Størri dentur verður nú lagdur á Samhaldsfasta og minni dentur á egna uppsparing.

Sostatt verður pensjónsnýskipanin ein meira samhaldsføst pensjónsskipan, har vit spara meira upp í felag. Eisini sjálv eginuppsparingin verður gjørd meira samhaldsføst, við at pensjónsskatturin lækkar fyri lægri inntøkurnar, og við at eftirlønargjald verður lagt afturat flestu almannaveitingum, útgjaldi úr ALS o.ø.

Meirilutin fegnast um, at tað er eydnast at finna eina semju á pensjónsøkinum, ið tryggjar teimum fólkapensjonistum, sum ikki hava stórvegis inntøku umframt fólkapensjónina og Samhaldsfasta, eitt hægri útgjald og í stóran mun tekur atlit at umstøðunum hjá tí einstaka.

Meirilutin metir, at hesar framdu broytingarnar á pensjónsøkinum, har pensjonistar 1. januar 2019 fara at hava góðar 2.000 kr. meira um mánaðin, eru til fyrimuns fyri pensjonistar. Lækkingin av grundupphæddini varð framd sum partur av hinum framdu broytingunum á pensjónsøkinum, sum hava givið pensjonistum væl meira at ráða yvir. Harumframt tryggjar javningarlógin, at pensjónirnar verða javnaðar, so pensjonistar ikki aftur enda í tí støðu, at virðið av pensjónini minkar vegna manglandi javning av pensjónsupphæddini.

Harumframt eru aðrar broytingar gjørdar at betra um fíggjarstøðuna hjá pensjonistum.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Kaj Leo Holm Johannesen, Jenis av Rana og Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur) tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Trivnaðarnevndin, 11. desember 2018**

Katrin Kallsberg
formaður

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
næstformaður

Óluva Klettskarð

Jenis av Rana

Djóni Nolsøe Joensen

Sonja Jógvansdóttir

Kaj Leo Holm Johannesen